


*gera lagnuna hjá henni um tvær vikur. Verður meiriluti fyri samanlegging við Klaksvík, fer Hvannasund at hvørva sum komma, men verður ístaðin partur av Norðoya Kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

allan vegin úr Havn á fundin, fyri at greiða bygdaráðnum frá roknskapinum, sum varð endaliga undirskrivaður í gjárkvøldið.

Men tann persónligi – ella ópersónligi! – tónin millum teir fimm limirnar varð lagdur næstan beinanvegin, tá uppskotið frá trimum teirra um møguliga samanlegging við Klaksvík kom á borðið.

Tikið varð til, við eini ávísari ironi, at hetta var eitt av fáum uppskotum, sum var komið inn rættstundis – tað er: áðrenn seinasta freist er at koma við uppskotum til tann regluliga bygdaráðsfundin.

Borgarstjórin førdi sjálvur orðið, og eftir at broytingar vóru gjørdar í sjálvari skránni, soleiðis at hetta gjørdist mál nummar eitt, varð tað lagt fram.

Hann las upp skrivið frá trimum av bygdaráðslimunum – tað vil siga: Hann byrjaði, men gakk. Hann steðgaði brádliga á, tí her vóru so nógvar paragraffir at lesa, og tøl upp og niður.

- Hygg, Pól. Kanst tú ikki bara lesa tað upp?!, segði hann við varaborgarstjóran, ið var ein av teimum trimum. Hann so gjørdi.

Í stutta skrivinum verður greitt frá gongdini í málinum, øllum skjølunum í málinum og hvussu fram skal farast hesar komandi vikurnar, við borgarafundi, fólkaatkvøðu og viðgerð av úrslitinum í bygdaráðnum.

## Skrumblað ígjøgnum

Sum skilst var ætlanin at fáa gjørda eina kunngerð um fólkaatkvøðuna beinanvegin, soleiðis at ásetta tíðarfreistin kundi haldast. Hetta er neyðugt at gera í slíkari bygd, har menn eru ella kunnu fara til skips, og har onnur fara burtur í øðrum ørindum.

Henda mannagongdin ljóðaði so ógvuliga skilagóð, men gakk: Nú vísti ein av bygdaráðslimunum á, at tað bar als ikki til at hava eina fólkaatkvøðu við so stuttari freist. 14 dagar er ikki nóg mikið, tí formaðurin í valnevndini hevði mælt til, at vallistarnir skuldu liggja frammi í minst fýra vikur, og at tað síðani skuldu ganga tvær vikur aftrat fyri at fáa valkortini út.

Skuldi henda mannagongdin fylgjast kundi fólkaatkvøðan í fyrsta lagi verða um hálvan oktober, og tá hevði verið í seinna lagið at fingið málið avgreitt innan kommunuvalið í november.

Meirilutin í bygdaráðnum vísti her á, at teir hava ferð eftir ferð biðið um fund til at kunna viðgera málið, soleiðis at tíðarfreistin kundi haldast og fólkið fáa góða tíð at lesa alt tilfarið ígjøgnum. Fyri teimum tykist tað heldur vera so, at hini høvdu bølt omaná málinum í alt ov langa tíð og ikki vilja viðgjørt tá, tá ein altso fyrst í gjárkvøldið kundi viðgera hetta álvarsama málið og samstundis kunna almenningin um tað.

Nú koma málið umsíðir undan kavi, og nú var brádliga full semja um at hava eina fólkaatkvøðu: Bæði borgarstjórin og hin bygdaráðslimurin í minnilutan vóru fyri eini fólkaatkvøðu, men spurningur teirra var, um ein ætlaði at fylgja úrslitinum av hesi

- Eg eri ikki ímóti eini fólkaatkvøðu, legði borgarstjórin dent á. – Men eg eri harðliga ímóti tí mátanum, sum hetta málið er viðgjørt. Tað er snøgt sagt skrumblað ígjøgnum, og tað kann eg ikki góðtaka!

Tá so atkvøðast skuldi vóru tríggjar atkvøður fyri at halda fram við samráðingunum við Klaksvík, soleiðis at ætlaða tilgongdin í samanleggingini kann halda fram sum ætlað.

Ein heilt annar spurningur er so, hvat fólkið í kommununi heldur. Væl er ein meiriluti fyri samanlegging í bygdaráðnum, men tað er meiri óvist, um maðurin við sundið er líka so samdur. Tey tykjast meiri at vera í villareiði, tí kunningin hevur verið so avmarkað. Kanska fer faldarin, sum nú skal berast út í hvørt hús, at bøta um alt hetta.

Tað vita vit mikukvøldið 17. september klokkan 20!

> *Tikið varð til, við eini ávísari ironi, at hetta var eitt av fáum uppskotum, sum var komið inn rættstundis – tað er: áðrenn seinasta freist er at koma við uppskotum til tann regluliga bygdaráðsfundin*